# Ordrafremjingarpolitikkur

**Galdandi frá 13.08.2013 fyri verandi og nýggjar kundar**

## 1. Endamál

Við tí í hyggju at røkka besta úrslitinum, tá BankNordik fremur handlar vegna kundar við fíggjarligum tólum, verða leiðreglurnar í hesum politikki fylgdar. Tá tú sum kundi heitir á BankNordik um at avgreiða ein handil fyri teg, gevur tú samstundis samtykki til, at ordrin verður framdur samsvarandi ásetingunum í hesum politikki. Ordrafremjingarpolitikkurin er ikki galdandi í sambandi við:

- Nýtekning og innloysing av íløguprógvum ella øðrum lutum í felags íløguskipanum
- Nýtekning og afturkeyp av partabrøvum
- Yvirtøkutilboð til partaeigarar

## 2. Fremjing av ordrum

Tá BankNordik fremur ella sendir víðari tínar ordrar, setur BankNordik, uttan so at onnur avtala er gjørd við teg, øll rímilig tiltøk í verk við tí í hyggju at tryggja tær tað besta úrslitið eftir galdandi umstøðum.

Í sambandi við fremjing av ordrum leggur BankNordik dent á hesi viðurskifti: kurs, gjaldføri, skjótleika, fremjingar- og avrokningarsannlíkindi, støðd á ordranum, ordraslag, gjøld, provisión og kostnaðir umframt onnur viðkomandi viðurskifti, sum kunnu hava týdning í sambandi við fremjingina av ordranum (“best execution”).

Í sambandi við fremjing av ordrum fyri smákundar (detailkundar) verður “best execution” ásett eftir samlaðu samsýningini, uttan so at endamálið við ordrafremjingini gevur boð um annað, ella aðrar umstøður gera seg galdandi. Samlaða samsýningin fevnir um kurs, gjaldføri, gjøld, provisiónir umframt aðrar kostnaðir í sambandi við fremjing av ordranum.

Tann sami ordrin kann verða framdur við at nýta ein ella fleiri av teimum hættunum, sum verða lýstir í hesum politikki.

## 3. Serligar treytir

Um so er, at tú ásetir serligar treytir í sambandi við fremjing av ordranum, fremur BankNordik ordran á best møguligan hátt við atliti at tínum ásettu treytum. Hesar treytir kunnu hava við sær, at BankNordik ikki kann lúka ásetingarnar fyri mannagongdir í hesum ordrafremjingarpolitikki, sum í flestu førum høvdu givið tær tað besta úrslitið.

Víkjast kann frá grundreglunum í “best execution” í teimum førum, ið nevnd eru niðanfyri:

- Tá kundar eru skrásettir sum góðkendir mótpartar.

- Tá BankNordik fyri egna rokning ásetir kundum, ið eru skrásettir sum yrkiskundar (professionellir kundar), ein prís, ella tá bankin avtalar treytir beinleiðis við ein kunda í sambandi við ein handil, har bankin er mótpartur.

## 4. Gjaldføri á keypskálum

Tað er meting bankans, at eitt fíggjarligt tól, sum er skrásett á einum reguleraðum marknaði ella í eini fleirparta handilsskipan (FHS), kann handlast til tann besta kursin á tí marknaðinum, har tað er størst gjaldføri í sambandi við tað ávísa fíggjarliga tólið. Um gjaldførið er stórt á marknaðinum, verður ordrin vanliga eisini framdur skjótt.

Tí velur bankin vanliga tann marknaðin, har gjaldførið er størst, um fíggjarliga tólið verður handlað á fleiri marknaðum. Tó kunnu serligar umstøður gera, at tann marknaðurin, sum vanliga gevur tað besta úrslitið, í eitt fyribils tíðarskeið ikki gevur tað besta úrslitið. BankNordik tekur sær rætt til í tílíkum førum at fremja ordran á einum øðrum marknaði, sum BankNordik metir fara at veita tær tað besta úrslitið.

## 5. Handil uttanum ein reguleraðan marknað ella FHS

BankNordik kann velja at fremja ein ordra uttanum ein reguleraðan marknað ella FHS. Hetta kemur fyri í teimum førum, har bankin fremur ordran mótvegis egingoymslu bankans við bankanum sjálvum sum mótparti ella beinleiðis við øðrum kundum sum mótparti. Henda ordrafremjingin er treytað av, at tú ikki hevur ásett serligar treytir hesum viðvíkjandi í sambandi við bílegging av ordranum.

## 6. Ordrafremjing í sambandi við fíggjarlig tól, sum í høvuðsheitum verða handlað beinleiðis á reguleraðum marknaðum

Hetta brot snýr seg um ordrar viðvíkjandi fíggjarligum tólum, sum regluliga verða handlað á reguleraðum marknaðum, FHS ella øðrum reguleraðum handilsstøðum. Tílík fíggjarlig tól eru eitt nú:

- Partabrøv
- Lánsbrøv
- Íløguprógv
- Vanlig fíggjarlig tól
- Onnur fíggjarlig tól, sum verða handlað á reguleraðum marknaðum

Bankin fremur tílíkar ordrar sum lýst niðanfyri:

- Ordrin verður beinanvegin skrásettur á tí marknaði, ið bankin metir vera besta marknaðin fyri kundan. Hetta er vanliga tann marknaðurin, sum seinastu tíðina hevur havt tað største gjaldførið á ávísa fíggjarliga tólinum.
- Um ordrin er so mikið stórur, at hann í sambandi við fremjingina krevur serlig fyrilit, kann BankNordik velja at fremja ordran í fleiri pørtum yvir eitt tíðarskeið, soleiðis at tú, eftir meting bankans, fært tað besta úrslitið.
- Um BankNordik metir, at tað er til tín fyrimun, og um umstøðurnar loyva tí, kann ordrin allur ella lutvíst verða framdur mótvegis bankans egingoymslu við bankanum sum mótparti, beinleiðis við einum mótparti í marknaðinum ella við einum øðrum kunda sum mótparti. Hetta er treytað av, at tað er sannlíkt, at kursurin í minsta lagi er tann sami, sum marknaðarkursurin.
- BankNordik kann bjóða at fremja størri ordrar beinleiðis mótvegis egingoymslu bankans til ein kurs, sum er avtalaður við kundan, og har tann avtalaði kursurin kann vera verri fyri kundan samanborið við galdandi marknaðarkurs fyri smærri ordrar. Mest sannlíkt vil avtalaði kursurin tó vera betri fyri kundan samanborið við galdandi marknaðarkurs, tá talan er um størri ordrar.
- Um BankNordik metir, at tað er tær til fyrimunar, kann bankin velja at leggja tín ordra saman við ordrum hjá øðrum kundum og síðani skráseta samlaða ordran á tí marknaðinum, sum bankin metir vera tann besta.

## 7. Fíggjarlig tól, sum sjáldan verða handlað á einum reguleraðum marknaði

Hetta brotið fevnir um tey fíggjarligu tólini, sum sjáldan verða handlað á einum uttanhýsis marknaði. Tílík tól eru eitt nú:

- Fíggjarlig tól í sambandi við peningamarknaðin
- Vinnulánsbrøv
- OTC-derivat
- Óskrásett partabrøv
- Onnur fíggjarlig tól, sum ikki verða handlað á einum uttanhýsis marknaði

BankNordik fremur tílíkar ordrar sambært niðanfyri nevndu ásetingum:

- Vanliga verður ordrin framdur mótvegis egingoymslu bankans. Bankin ásetir prísin við støði í ávikavist galdandi marknaðarprísum, sum eru atkomuligir fyri bankan, vísitølum ella rentum, sum eru partur av bygnaðinum hjá tí fíggjarliga tólinum, ella øðrum týðandi marknaðarviðurskiftum. Prísurin verður harafturat ásettur við støði í skipanum bankans og fevnir um øll gjøld, undir hesum kapitalbyrðu, kredittváða, operationellan váða, mótpartsváða og marginalin, sum er knýttur at marknaðinum.

## 8. Handilsstøð

BankNordik kann fremja ein ordra á ymiskum reguleraðum marknaðum og handilsstøðum. Tá ordrin verður framdur, nýtir BankNordik tað handilsstaðið, sum gevur kundanum besta úrslitið. Tá BankNordik velur handilsstað, verður lagt upp fyri teimum viðurskiftum, sum eru nevnd í grein 2. Bankin tilskilar sær rætt til at nýta handilsstøð eftir egnum vali, um hetta verður gjørt til tess at tryggja tær tað besta úrslitið, sum til ber, og um valið harafturat er í samsvari við henda ordrafremjingarpolitikk. Bankin metir regluliga um handilsstøðini fyri at tryggja, at ordrarnir framhaldandi verða framdir á besta hátt fyri kundan. Eitt yvirlit yvir týdningarmiklastu handilsstøð bankans er at finna á heimasíðu bankans.

BankNordik kann velja at fremja tín ordra uttanum ein reguleraðan marknað ella FHS. Hetta merkir, at ordrin verður framdur við bankanum sum mótparti.

## 9. Samstarvsfelagar

BankNordik leggur dent á, at ordrafremjingin fer fram í samsvari við tíni áhugamál. Bankin

samstarvar við aðrar virðisbrævahandlarar og peningastovnar viðvíkjandi fremjing av tínum ordrum, um BankNordik metir tað vera neyðugt ella gagnligt, ella um bankin ikki sjálvur hevur beinleiðis atgongd til tann ávísa marknaðin.

BankNordik ger eina meting av hvørjum einstøkum samstarvspeningastovni ella virðisbrævahandlara. Tá bankin velur ein peningastovn at samstarva við í sambandi við fremjing av tínum ordra, leggur BankNordik upp fyri teimum "best execution" viðurskiftum, ið eru nevnd omanfyri í grein 2. Eitt yvirlit yvir týdningarmiklastu samstarvsfelagar bankans er at finna á heimasíðu bankans www.banknordik.fo.

## 10. Avgreiðsla av ordrum, samanlegging og sundurbýting

BankNordik avgreiðir tínar ordrar skjótt, virkið og rættvíst. Ordrar, sum kunnu javnsetast, verða framdir beinanvegin og í teirri raðfylgju, teir eru móttiknir, tó treytað av, at ordrarnir eru av einum tílíkum slagi, og marknaðarumstøðurnar gera, at hetta ber til og ikki er í stríð við tíni áhugamál.

BankNordik kann leggja tín ordra saman við ordrum hjá øðrum kundum og/ella bankans egnu ordrum, um samanleggingin ikki er til ampa fyri teg ella hinar kundarnar.

Tá ein samanlagdur ordri verður framdur, verður hann býttur sundur til ein miðalkurs. Um ein samanlagdur ordri einans lutvíst er framdur, vil tann framdi parturin verða javnt býttur við støði í miðalkursinum. Um ein ella fleiri kundaordrar verða lagdir saman við ordrum fyri bankans egnu rokning, og tann samanlagdi ordrin einans lutvíst verður framdur, luttekur BankNordik ikki í býtinum, fyrr enn allir luttakandi kundaordrar eru framdir í síni heild.

## 11. Órógv á marknaðinum ella í handilsskipanunum

Tá slit kemur í á marknaðinum orsakað av trupulleikum við tøkniligum skipanum ella av øðrum orsøkum, kann tað eftir meting bankans vera ógjørligt ella til bága fyri teg at fremja ein ordra á tann hátt, sum lýst er í hesum ordrafremjingarpolitikki. BankNordik tilskilar sær rætt til í tílíkum førum at fremja neyðugu átøkini, soleiðis at tað á annan hátt ber til at fremja tín ordra, so besta úrslitið verður rokkið.

Um slitið í handlinum førir við sær álvarsama órógv á marknaðinum ella í handilsskipanunum, skal bankin gera eina hóskandi roynd at fáa fatur á tær, við tí í huga at koma fram til, hvussu ordrin skal fremjast í støðuni. Um tað ikki eydnast bankanum at fáa fatur á tær, hevur bankin rætt til at røkja tíni áhugamál á bestan hátt, og tú verður tá bundin av úrslitinum av avgerðunum hjá BankNordik.

Um ein ordri verður strikaður ella broyttur av marknaðinum, verða BankNordik og kundar bankans bundin av hesum, sjálvt um bankin undir ávísum umstøðum longu hevur váttað mótvegis tær, at ordrin er framdur.

## 12. Broytingar í ordrafremjingarpolitikkinum

BankNordik fer árliga ígjøgnum ordrafremjingarpolitikkin og fremur neyðugu tillagingarnar fyri at tryggja, at tínir ordrar framhaldandi verða framdir á ein tílíkan hátt, at tú fært best møguliga úrslitið. Broytingar og dagføringar eru galdandi frá og við tí degi, tá hesar eru almannakunngjørdar á heimasíðu bankans. Tú fært ikki serliga fráboðan, tá ordrafremjingarpolitikkurin verður broyttur ella dagførdur. Bankin mælir tær tí til regluliga at kunna teg um broytingar í ordrafremjingarpolitikkinum á heimasíðu bankans www.banknordik.fo.